**Eldraráðið í Tórshavnar kommunu**
**Tórsgøta 21, 100 Tórshavn**
**eldrarad@torshavn.fo**

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Eldraráðið 2021 – 2024

| | |
|---|---|
| Fundur: | Nr. 9, 10, 11 |
| Tíð: | 11-09-2023 kl. 13.00 – 15.00 |
| | 21-09-2023 kl. 13.00 – 15.00 |
| | 25-09-2023 kl. 13.30 – 14.00 |
| Stað: | Tilhaldið í Tórsgøtu |

**Møtt:** Katrin Holm, forkvinna, Robert Vilhelmsen, næstformaður, Petur Rouch, skrivari, Julianna Klett, kassameistari, og Marin Rasmussen, limur.

**Fundarskrá:**

1. Eldradagurin 2023

<u>AD 1 Eldradagurin 2023</u>

Høvuðsevnið á øllum trimum fundum var Eldradagurin, sum verður í Dansifrøi fríggjadagin 20. oktober 2023.

Fundirnir 9 og 10 hava verið nýttir til at orða innihald til dagin, at leggja skránna til rættis og til at fáa samband við relevant fólk at hava innlegg.

Fundur 11 var fyrireiking til fund við Tórshavnar kommunu (Heðin Mortensen og Marjun Berg) klokkan 14.00 – 15.30.

Á fundinum við Tórshavnar kommunu varð uppskot um innihald til dagin lagt fram. Borgarstjórin tók væl ímóti uppskotinum.

Síðani er arbeitt víðari við uppskotinum, sum í skrivandi stund sær soleiðis út:

***Innbjóðing til Eldradag 20. oktober.***

***Eldraráðið bjóðar til árliga eldradagin 20. oktober.***

***Borgarar í Tórshavnar kommunu, í aldursbólkinum 60 og eldri, verða við hesum bodnir til eldradagin 2023. Lagt er upp til ein spennandi og hugnaligan dag við ítøkiligum og týðandi evnum, sum eru uppi í tíðini, og møguleikanum at samskifta og hugna sær saman.***

***Dagurin verður hildin í hølunum hjá Dansifrøi í Havn fríggjadagin 20. oktober kl. 10 - 15.***

**Eldraráðið í Tórshavnar kommunu**
**Tórsgøta 21, 100 Tórshavn**
**eldrarad@torshavn.fo**

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

***Høvuðsevni:***

***Ljós verður varpað á raðfestingina og tiltøk á eldraøkinum hjá landsstýrinum og Tórshavnar kommunu. Tað er ein sannroynd, at bólkurin 67+ veksur alsamt og verður av myndugleikum umrøddur sum ein tann største samfelagsliga avbjóðingin fyri framman. Við grundarlag í hesum veruleika verða ymiskir viðkomandi fyrilestrar, sum enda við pallborði, har borgararnir fáa høvi at bera fram og fáa viðgjørt sínar spurningar.***

***Skrá:***

| | |
|---|---|
| ***Kl. 10.00 - 10.10*** | ***Eldraráðið bjóðar vælkomin og kunnar um skránna og endamálið við degnum. Árni Gregersen verður orðstýrari.*** |
| ***Kl. 10.10 - 12.00*** | ***Fyrilestrahaldarar á viðkomandi økjum:***<br>***Heðin Mortensen, borgarstjóri í Tórshavnar kommunu***<br>***Margit Stórá, landsstýriskvinna í heilsumálum***<br>***Magni Mohr, professari***<br>***Heri Petersen, fulltrúi í Almannaráðum – Um pensjónsviðurskifti***<br>***Johnny í Grótinum, búskaparfrøðingur, lýsir serlig viðurskifti á økinum***<br>***Robert Vilhelmsen, Eldraráðið, kunnar um spurnarkanning, sum Spyr.fo hevur gjørt fyri Eldraráðið, og um endamálið við Eldraráðnum*** |
| ***Kl. 12.00 - 13.30*** | ***Matarsteðgur - høvi at práta saman og tónleikur við sangi*** |
| ***Kl. 13.30 - 14.55*** | ***Pallborð við luttøku av fyrilestrarhaldarunum, har høvi verður at seta teimum spurningar at viðgera*** |
| ***Kl. 15.00*** | ***Eldraráðið tekur samanum og takkar fyri fyri dagin*** |

***Tilmelding: Allir borgarar, 60 ár og eldri, í Tórshavnar kommunu eru vælkomnir at luttaka. Luttøkutalið er avmarkað til 300 og luttøkugjaldið er kr. 210, íroknað sjálvtøkuborð kl. 12.***

***Melda til á www.atgongumerki.fo í seinasta lagi 18. oktober.***

Tórshavn 27-09-2023

Petur Rouch,
skrivari